

# Leys størv

## Maskinførari

Tórshavnar kommuna søkir eftir maskinførara til gøtugerð. Arbeiðið fevnir um nýgerð og størri umvælingar av gøtum. Arbeitt verður við maskinu uppá 1630 kg/12,5 kW. Annað graviarbeiði kann koma uppá tal.

**Vit rokna við, at tú**
- hevur royndir at arbeiða við gravimaskinu
- hevur koyrikort til traktor-/motoramboð ella kat. B

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tímalønt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir – herundir viðbót – sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 19. oktober 2007. Merkið umsóknina „maskinførari".

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til røktarleiðaran, Jógvan Olsen, ella býargartnaran, Tóra í Hoyvík, tlf. 30 20 10.

## Pedagogar til Dagstovnin á Landavegnum

Søkt verður eftir tveimum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna. Annað starvið er á barnagarðsstovu, hitt er eitt farloyvisstarv frá 1. oktober 2007 til 1. januar 2007.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum á Landavegnum, Landavegur 84, 100 Tórshavn í hendi seinast mánadagin 15. oktober 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kirstin Djurhuus, stovnsleiðara, ella Brynhild Guttesen, varaleiðara á tlf. 30 23 80 / 30 23 81.

## Pedagogur til Dagstovnin á Hamrinum

Søkt verður eftir einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. november 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum á Hamrinum, Glyvursvegur, 160 Argir í hendi í seinasta lagi mánadagin 15 oktober 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Elisabeth Henriksen, stovnsleiðara, tlf. 32 20 03 ella 22 57 84, ella við at vitja heimasíðu okkara: www.123hjemmeside.dk/dag-ham

## Reingerðarfólk til fyrisitingina

Søkt verður eftir avloysara til reingerð til fyrisitingina hjá Tórshavnar kommunu.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
saman við møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi innan fríggjadagin 12. oktober 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Gudni Olsen á tlf. 22 12 81 ella 30 20 10.

## Reingerðarfólk til Dagstovnin í Løkjatúni

Søkt verður eftir einum reingerðarfólki at arbeiða 12,5 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, 160 Argir, í hendi innan fríggjadagin 5. oktober 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Steinbjørn V. Olsen, stovnsleiðara, tlf 30 23 90 / 21 42 27.

**Tórshavnar kommuna**